Dysturin um póløkið nærkast

Granskarar hjá amerikanska jarðfrøðistovninum US Geological Survey siga við kanadiska blaðið The Globe and Mail, at 13 prosent av heimsins oljugoymslum og 30 prosent av heimsins gassgoymslum eru í økinum kring Norðpólin. Amerikonsku granskararnir almannakunngjørdu herfyri eina frágreiðing, og har mettu teir, at tað eru umleið 80 milliardir tunnur av olju í tí arktiska økinum. Londini í økinum fyrireika seg til ein harðan dyst um ræðisrættin til økið. Eygleiðarar halda, at tann sera jaliga frágreiðingin hjá US Geological Survey kann fáa amerikanararnar at fara undir nýggjasr boringar í Alaska, tí framleiðslan úr verandi brunnum er minkandi. Tað kann seta ferð á dystin um økið.

Óvanliga lýtt vár

Várið í ár var eitt tað lýggjasta í Danmark í mong ár. Veðurstovan DMI sigur, at í mars, apríl og mai var meðalhitin 8,3 stig, og tað er 2,1 stig oman fyri meðalhitan fyri teir tríggjar mánaðirnar í árunum frá 1960 til 1990. Harafturat var várið í ár tað fjórðlýggjasta, síðani tær landsumfatandi hitamátingarnar í Danmark byrjaðu í 1874. Tey trý várini, sum vóru lýggjari, vóru í 2007, 1990 og 1921. Veðurstovan sigur, at í mai var meðalhitin 11,5 stig, sum er 0,8 stig oman fyri tað vanliga. Men hetta er tann vanliga myndin í dag, tí av teimum 38 seinastu mánaðunum vóru 37 lýggjari enn meðal, sigur DMI.

Trupult at fáa vetrarfriðað

Eitt av nógv umrøddu málunum á borgarafundinum í Nólsoy í gjárkvøldið var spurningurin um vetrarfriðing av bygdini. Drúgvar samráðingar hava verið, men málið er endað í naggatódn

BORGARAFUNDUR
Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo

Inn vórðu savnaðar 143 undirskriftir við áheitan um at fáa bygdina vetrarfriðaða. Her fær borgarstjórin, Heðin Mortensen, undirskriftirnar handaðar av einum av stigtakarunum, Unu Hansen
Mynd: Leo Poulsen

Eitt av fleiri punktum á skránni til borgarafundin í skúlanum í Nólsoy í gjárkvøldið, var spurningurin um at vetrarfriða bygdina.

Tað kom fram á fundinum, at drúgvar samráðingar hava verið millum hagapartin, sum eigur vetrarbitið, og kommununa, og leingi sá út til, at tað skuldi eydnast at finna eina loysn, sum báðir partar kundu góðtaka. Men so kom stígur í.

Sakførarin hjá kommununi, sum var við á fundinum, greiddi frá, at krøvini frá hagapartinum, Heimarahelvt, gjørdust so stór, at kommunan kundi ikki ganga teimum á møti.

Serligi trupulleikin við at hegna Nólsoyar bygd inni er, at tað finst eitt rættiliga stórt øki norðan fyri bygdina, sum verður avskorið við einari innhegning. Haganevndin hevur tí sett fram krav um, at ein geiri skal hegnast, so seyðurin frítt kann ganga millum vetrarbeitið norðan fyri og tað sunnan fyri bygdina. Men hetta kostar nógvan eyka pening, og tað vil kommunan ikki ganga við til at gjalda.

Málið fekk drúgva umrøðu á fundinum, og nólsoyarfólk eru mest sum øll samd um, at tað ber ikki til í 2009 at hava seyð gangandi malandi inni í øllum urtagørðum í bygdini.

143 undirskriftir

Tá tað varð greitt, at vetrarfriðing var eitt punkt á skránni fyri borgarafundin, gjørdu tríggjar kvinnur skjótt av og fóru undir at savna undirskriftir til tess at fáa bygdina vetrarfriðaða.

Tær býttu bygdina upp millum sín og gingu síðani hús úr húsi, og úrslitið gjørdist 143 undirskriftir, sum er mest sum alt tað vaksna íbúgvaratalið í oynni. Hesar vórðu so handaðar Heðini Mortensen, borgarstjóra, á fundinum.

Hóast borgarstjórin áður hevur sagt, at nú gjørdi kommunan ikki meiri við málið at vetrarfriða Nólsoyar bygd, so metti hann, at undirskriftirnar bendu á, at enn ein roynd eigur at verða gjørd at finna eina loysn á málinum.

Hann helt, at málið kanska nú er so mikið mýkt, at glið kann fáast á samráðingarnar aftur.

Betri skurð

Við á fundinum var eisini umboð fyri Heimaruhelvt, og førdi hesin fram, at vetrarbitið hevði stóran týdning fyri hagan. Meðan tað fyrr var vanligt bert at sleppa gimbrar innangarðs, so var mann gingin burtur frá hesum seinastu árini. Hugsanin var tann, at gimbrarnar ikki skuldu lemba fyrsta árið, men nú er hetta vanligt, so eisini ærnar verða sleptar innangarðs um veturin. Og tað eru tær, ið skapa trupulleikan við at loypa inn í urtagarðarnar og eta alt, ið fyrilegst.

Víst var á, at skuldi vendast aftur til gomlu skipanina við at avskera gimbrarnar, so tær ikki lemba, fór hetta at merkja ein munandi verri skurð hjá haganum, við fylgjandi kostnaði við sær.

So trupulleikin liggur fyrst og fremst í at tryggja seyðinum ein geira millum syðra og norðara part av vetrarbitinum.

Á fundinum kom eisini fram, at kommunan bjóðaði hagapartinum at flyta seyðin við akførum norður um bygdina nakrar ferðir um veturin, men hetta segði hagaparturin seg ikki kunna ganga við til.

Arbeiðið gjørt

Tóri í Hoyvík, býargartnari, var við á fundinum, og hann greiddi frá í orðum og myndum, at arbeiðið við at vetrarfriða bygdina í veruleikanum longu er gjørt. Tað einasta, sum manglar, er at seta eitt rulluportur í hvør sín enda á bygdini, og tey bæði rulluportrini eru longu keypt og goldin og liggja klár á havnarlagnum í Nólsoy og bíða eftir, at verða sett upp.

Eisini er øll hegningin liðug, og tað einasta ið krevst har, er at seta nøkur portur í ymsastaðni. So tað er greitt, at kommunan hevur hildið seg staðið við einari loysn í hondini, síðani hon hevur latið hetta arbeiðið gjørt.

Knúturin, sum nú skal loysast, er mest av juridiskum slag, men tá tað er so týðiligt, at bygdarfólkið ynskir bygdina vetrarfriðaða, ger kommunan enn eina roynd at finna eina loysn á trupulleikanum.

Bygdin astfalterast

Í eitt gott ár hevur verið arbeitt við at leggja nýggjar kloakkir í Nólsoy, og á borgarafundinum í gjárkvøldið var ætlan fyri astfaltering av bygdini løgd fram

BORGARAFUNDUR
Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo

Nærum hvør einasti vegastubbi í bygdini í Nólsoy er grivin upp. Seinasta góða árið hevur verið arbeitt við at leggja nýggjar kloakkir í Nólsoy, og nú tað arbeiðið er um at verða liðugt, eru ætlanir gjørdar fyri at hampa um vegirnar aftur.

Stórir partar av vegunum verða astfalteraðir heilt, meðan á øðrum strekkjum verður helvtin av koyribreytini astfalterað. Hetta er ein meting, sum vegadeildin hjá kommununi hevur gjørt.

Tað er EM Astfalt, sum skal gera arbeiðið fyri Tórshavnar kommunu, og felagið kemur longu út til Nólsoyar um hálvan juni at byrja arbeiðið. Alt verður tó ikki gjørt í einum, eisini tí, at kloakeringin sjálv ikki er heilt liðug enn.

Annars var upplýst, at arbeiðið hevur gingið væl, og at tíðarætlanin hevur hildið.

Sum nevnt skal øll koyribreytin astfalterast á stórum pørtum av vegastrekkjunum, meðan á øðrum verður bert hálv koyribreytin astfalterað. Á fundinum varð upplýst, at miðað verður ímóti, at astfaltarbeiðið skal verða liðugt til Ovastevnu, sum verður vikuskiftið14.-16. august.

Nærum hvør einasti vegastubbi er uppgrivin, og nú skal so alt astfalterast aftur
Mynd: Álvur Haraldsen